

*Hóast hon ikki vinnur, so fara øll fólk í Íslandi at kennast við navnið Eivør Pálsdóttir eftir Grand Prixið, sum verður hildið leygarkvøldið.*

*Mynd: Tom Laursen*

# Nú skal Eivør royna seg

**Leygarkvøldið fer Eivør Pálsdóttir at syngja í íslendska Grand Prixnum. Familja og vinir fara at fylgja luttøkuni í Reykjavík, og í Føroyum ber til at uppliva alt í Sjónvarpi Føroya, sum fer at samsenda beinleiðis við íslendska sjónvarpið**

GRAND PRIX
*Eyðun Klakstein*

Eivør Pálsdóttir stendur framman fyri eini nýggjari og spennandi avbjóðing. Songkvinnan úr Gøtu skal vera við í íslendska Grand Prixnum, og har fer hon at kappast við 14 aðrar sangir um plássið, sum hevur við sær luttøku í altjóða Grand Prixnum.

Í jólamánaðinum hevði Eivør tvær frálíkar konsertir saman við íslendska bólki sínum. Í hesum bólki eru tríggir royndir og avbera góðir tónleikarar, og tað er ein av hesum, sum hevur skrivað sangin, sum Eivør skal syngja.

Á jólakonsertunum var talan um jazzmerktan tónleik, hóast sumt førkaði seg eitt sindur yvir í popp ella fólkatónleik. Sangurin, sum Eivør skal syngja, er eisini jazzutur, og hann er friðarligur. Hetta er ein tónleikastílur, sum Eivør meistrar, men spurningurin er, um ein slíkur sangur kann vinna eina kapping, sum ofta er merkt av meira ferðamiklum og løttum popptónleik.

**Trupult at vinna**
Eisini í Íslandi kunnu øll senda sangir til eina upptøkunevnd, og nógv eru, sum bjóða seg fram til Grand Prixið.

Hesaferð vera15 sangir við í kappingini, og talan er ikki bara um bleytar poppsangir. Punk/grunge-bólkurin Botnleðja, rocksangarin Heiða, rocklegendan Rúnar Júlíusson og Eivør Pálsdóttir eru við, og tað skapar størri breidd í kappingini.

Sambært íslendska tónleikablaðmanninum, Jens Guð, er songkvinnan Birgitta favorittur til at vinna kappingina hesaferð.

– Øll fólk kunnu atkvøða fyri teimum 15 sangunum við at ringja til ávís telefon nummur, og ikki minst ungfólk eru íðin at atkvøða. Hetta ger, at Birgitta er stórur favorittur. Hon er íslendska Britney Spears, og tað ger tað sama, um hon fer at syngja ein góðan ella vánaliga sang. Hennara stóri fjepparaskari fer at atkvøða fyri henni, og so verður trupult hjá nøkrum øðrum at vinna, heldur Jens Guð.

Men hann heldur eisini, at Eivør kann fáa nógv burtur úr luttøkuni.

– Sjálvt um hon kanska ikki fer at vinna, so fara øll fólk í Íslandi at kennast við navnið Eivør Pálsdóttir eftir Grand Prixið.

**Føroyar og Ísland**
Eivør Pálsdóttir hevur seinasta árið verið nógv í Íslandi, har hon hevur funnið sær ein bólk at spæla saman við. Talan er um virdar íslendskar tónleikarar, sum hava royndir úr nógvum ymiskum samanhangum.

Eivør hevur tó ikki slept føroyska tónleikinum, tí hon er framvegis við í bólkinum Clickhaze, har hon eisini fekk sítt stóra gjøgnumbrot. Tað var til finaluna í Prix Føroyum í 2001, at Eivør reyk ígjøgnum ljóðmúrin og gjørdist umtala allastaðni í landinum. Hon var jokarin, sum gjørdi Clickhaze til vinnara í kappingini, og síðani hevur hon ferð eftir ferð víst, at hon helst er okkara fremsta songkvinna.

Fyri tveimum vikum síðani stóð Guðrun Jacobsen seg sera væl í eini danskari kapping, og nú sleppur Eivør at royna seg í eini íslendskari. Jú, føroyskur tónleikur hevur nógv at fegnast um í løtuni.

Sjónvarp Føroya fer at senda beinleiðis frá íslendska Grand Prixnum leygarkvøldið, og tað verður gjørt í samstarvi við íslenska sjónvarpið, sum stendur fyri kappingini.